# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 19. november 2024 |
| Mál nr.: | 24/25534 |
| Málsviðgjørt: | RNA |
| Ummælistíð: | |
| Eftirkannað: | |

**Kunngerð**
**um roknskapartøl til uppgerð av miðal framleiðslukostnaðinum**

Við heimild í § 2, stk. 6, í løgtingslóg nr. 65 frá 30. mai 2024 um tøkugjald, verður ásett:

**§ 1.** Alifyritøkurnar skulu lata inn roknskapartøl, ið skulu vera grundarlag undir útrokning av framleiðslukostnaðinum, K.
*Stk. 2.* Roknskapartølini fevna um:
1) Kostnaðir til rávørur og hjálpitilfar.
2) Goymslubroytingar.
3) Aðrar uttanhýsis kostnaðir, samlað og útgreinað.
4) Starvsfólkakostnaðir.
5) Avskrivingar og niðurskrivingar.
6) Sølu- og flutningskostnaðir.

*Stk. 3.* Miðal framleiðslukostnaðurin, K, verður roknaður við støði í roknskapartølum úr seinast grannskoðaða ársroknskapinum.
*Stk. 4.* Roknskapartølini skulu latast avvarðandi aðalráði áðrenn 15. desember árið fyri, at framleiðslukostnaðurin verður almannakunngjørdur.
*Stk. 5.* Avvarðandi aðalráð kann áleggja fyritøkunum at viðleggja váttan frá grannskoðara felagsins um innsendu uppgerðirnar, tá tað verður mett neyðugt fyri at sanna, at uppgerðirnar bert innihalda kostnaðir sambært skjali 1 í løgtingslóg um tøkugjald, og eru rætt tíðaravmarkaðar.

**§ 2.** Alifyritøkurnar skulu saman við roknskapartølunum lata inn tøkutøl fyri roknskaparárið, ið roknskapartølini viðvíkja.

**§ 3**. Miðal framleiðslukostnaðurin, K, verður fyrstu ferð almannakunngjørdur á heimasíðuni hjá avvarðandi aðalráði tann 1. januar 2025.
*Stk. 2.* Miðal framleiðslukostnaðurin, K, verður roknaður og ásettur av nýggjum triðja hvørt ár sbr. § 2, stk. 4, í løgtingslógini.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2025.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 19. november 2024

**Høgni Hoydal (sign.)**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)